í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

# Grand Prixið leygarkvøldið



Leygarkvøldið verður finalan í Eurovision sangkappingini hildin í Beograd Arena í Serbia. 25 lond kappast um at vinna Grand Prixið, og hyggjarar kring Europa gera av, hvør skal vinna. The Dreams tók lut í innleiðandi donsku kappingini, og Brandur Enni var við í svensku kappingini, men hvørgin av teimum verða við leygarkvøldið. Sjónvarp Føroya sendir beinleiðis frá finaluni, og tað er leygarkvøldið frá kl. 20.00.

# Serskøltar í nýggjum filmi



Beavis and Butthead vóru tveir serskøltar í eini teknirøð á MTV í 1990'unum. Seinni vóru teir eisini við í einum spælifilmi. Nú ætlar maðurin, sum kom við hugskotinum um Beavis and Butthead at gera ein nýggjan film, og hesaferð skulu veruligir sjónleikarar spæla teir báðir løgnu tannáringarnir við áhuga fyri tónleiki.



# Senda fólk til smástjørnu

Amerikanski rúmdarfelagsskapurin NASA hevur eina ætlan um at senda rúmdarfólk til eina smástjørnu. Higartil hevur hetta bert verið gjørt á filmi úr Hollywood – millum annað Armageddon – men tað kann nú eisini gera veruleiki. Smástjørnan, sum hevur navnið 2000SG344 er til støddar sum ein bátur og ferðast 45.000 km/t. Endamálið við ferðini til smástjørnuna er at fáa upplýsingar um, hvat kann gerast, um ein slík smástjørna í framtíðini hevur kós ímóti jørðini og fer at hótta lívið á klótuni.
Suðurafrika, Argentina, Kina og Australia eru avlýstar.

# Forsetafrúan við nýggjum tónleiki



Franska forsetafrúan Carla Bruni kemur í næstum út við nýggjari fløgu, men hóast fleiri av sangunum á útgávuni snúgva seg um kærleika, so er tað ikki um franska forsetan Nicolas Sarkozy. So at siga allir sangirnir útgávuni eru skrivaðir, áðrenn Carla Bruni hitti Sarkozy. Tey bæði giftust í februar mánaði. Nýggja fløgan hjá Carla Bruni verður í sølubúðunum tann 21. juli.

# Joachim giftist í morgin

Leygardagin verður stórt brúdleyp í kongaríkinum. Tað er danski Joachim prinsur, sum giftist við fronsku Marie Cavallier. Vígslan verður í Møgeltønder kirkju, og sjónvarpið hjá Danmarks Radio fer at gera nógv burtur úr degnum. Eisini føroyska sjónvarpið fer at samsenda við DR, og tað verður gjørt frá kl. 11.00 fyrrapartin. Sjálv vígslan verður klokkan 17.00.



Sosialurin